# 170 ungfólk á einum staði

***Nesvík:*** **Seinna ungdómslegan í summar byrjaði mánadagin og endar í morgin.**
**Á leguni eru 170 ungfólk kring alt landið savnaði saman. Her hoyra tey um Gud, tey hava nógv ymiskt á skránni og tey brúka nógva tíð bara at tosa saman.**
**Tey hava eisini havt serstøk tiltøk um kvøldið. Mánakvøldið var konsert við kenda bólkinum Proclaim, og týskvøldið var ungdómsgudstænasta við altargongd í Norðskála kirkju, har Jóannes Fonsdal og Emil Olsen luttóku.**



*Tað eru ikki bert menn, sum verða føddir við ár í hond. Genturnar royna seg eisini við árunum, men ikki er so lætt at rógva, tá eingir tollar eru*

# Gott at vera saman við góðum fólki

**15 ára gamla Herborg Hansen hevur ofta verið á ungdómslegum áður. Nú er hon aftur í Nesvík, saman við eini vinkonu úr Klaksvík. – Her er gott at vera, tí vit eru so nógv, og tí vit hoyra um Jesus, sigur hon**

UNGDÓMSLEGA
*Snorri Brend*

**Nesvík:** – Nei, nei. Hóast mær dámar væl at telva, so havi eg ikki tikið talvborðið við mær á leguna. Onkutíð má ein hava frí frá telvingini!, sigur Herborg brosandi.

Herborg dámar væl at telva, og hevur tvær ferðir vunnið FM í talvi fyri unglingar við Klaksvíkar Talvfelagi – seinnu ferðina fyrr á árinum. Og so dámar henni væl at spæla flogbólt og fótbólt.

Umframt alt hetta, so dámar henni eisini væl at ganga til andalig tiltøk í Klaksvík. Hon er á ungdómsmøtum bæði í KFUM &K og í Betesda.

- Eg havi verið á fleiri legum á Zarepta, men hetta er so aðru ferð at eg eri her í Nesvík. Og her er gott at vera, sigur hon.

Í fríløtuni seinnapartin mikudagin vóru hon og vinkona hennara, Lilja Thorsteinsson úti á grøna vøllinum og tóku nøkur skot framvið flogbóltsnetinum.

- Tað er altíð gott at hava onkran, sum man kennir at fylgjast við, sigur Herborg.

## Breytir

Á leguni er hvønn dag møguleiki at velja seg inn á onkra breyt við áhugaverdum evnum.
Mikudagin vóru hesir møguleikar:
Kór
Capture the Flag
Gongutúrur
Filmur: The Passion of Christ
Filmur: Luther
Sminku-kapping

### Góðar breytir

Heimamissiónin skipar í ár fyri tveimum ungdómslegum. Á teirri fyrru leguni vóru eingi fólk úr Klaksvík, helst orsakað av Summarfestivalinum har.

Men á hesi leguni eru fleiri hagani – teirra millum Herborg og fleiri onnur, sum hon kennir úr Klaksvík.

Og hon hevur higartil verið sera fegin um alt tað, hon hevur verið við til á hesi ungdómsleguni.

- Mær dámar væl at tosa við onnur fólk, og at spæla flogbólt.

- Og eg haldi eisini, at evnini á øllum hesum ymisku breytunum, sum vit kunnu velja millum, hava verið sera áhugaverd, sigur hon.

At tað eru so nógv onnur ungfólk úr øllum landinum savnaði á leguni, fegnast hon eisini um.

- Ein kemur at kenna nýggj fólk, og so kenni eg eisini nógv onnur frá fyrr av, sigur hon.

Millum luttakararnar hevur hon eisini heilsað uppá ein drong úr Vágum, sum hon onkutíð hevur møtt í sambandi við talvkappingar kring landið.



*Hon hevur verið til sminku-kapping og hár hennara er gjørt til*

### Gott at hoyra umaftur

Evnið fyri bíbiltímarnar á hesi ungdómsleguni er bønin Faðir Vár.



Og hesa undirvísingina hevur Herborg eisini verið glað um.

- Vit hava higartil lært um tríggjar tær fyrstu bønirnar í Faðir Vár.

- Hóast eg havi hoyrt um tað fyrr, so er tað altíð gott at hoyra tað enn einaferð, sigur hon.

Á møtunum um kvøldarnar og í sambandi við máltíðirnar er altíð vitnisburðir á skránni. Hetta hevur eisini verið við til at gera leguna góða og spennandi.